# Kvinnur keypa privata burðarhjálp

**Fleiri og fleiri danskar kvinnur eru ónøgdar við burðarhjálpina frá tí almenna. Heldur gjalda tær fleiri túsund krónur fyri at fáa umsorgan og tryggleika aðrastaðni frá**

BURÐARHJÁLP
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*



*Tvær tvíburðafamiljur: Rasmus og Turið Magnussen og Louisa Fjallsbak og Julian Thomsen*

Altsamt fleiri danskar kvinnur ynskja at keypa sær stuðul, umsorgan og tryggleika, áðrenn tær fara á føðistovuna at eiga. Eitt nú keypa fleiri ein persónliga burðarvenjara, sum kemur við á sjúkrahúsið, meðan aðrar kvinnur rætt og slætt ikki taka ímóti burðarhjálp frá tí almenna, men heldur fara á eina privata føðistova at eiga.

- Privatar føðistovur eru komnar orsakað av, at fleiri smáar føðistovur hjá tí almenna eru latnar aftur. Tær, ið eru eftir, eru sera stórar. Ljósmøðurnar hava nógv at gera og skulu í heilum ansa eftir fleiri barnsburðum í senn. Harumframt eru føðifyrireikingar nógvastaðni spardar burtur. Ljósmøðurnar ásanna, at umstøðurnar ikki eru góðar, men loysnin er avgjørt ikki at hava burðarvenjara við sær á sjúkrahúsið. Heldur skulu kvinnurnar krevja frá politikarunum at fáa betri burðarhjálp frá tí almenna, sigur Lillian Bondo, forkvinna í danska felagnum fyri ljósmøður.

Mia Jiaya Gilling Borgman, sálarfrøðingur og royndur burðarvenjari, sigur, at tað kostar um 6000 krónur fyri ein privatan burðarvenjara. Fyri tveimum árum síðani byrjaði hon at útbúgva aðrar burðarvenjarar, og metir hon, at um 30-40 privatir burðarvenjarar eru í Danmark:

- Eftirspurningurin er stórur og vaksandi. Kvinnurnar fáa tíverri ikki ta tænastu frá tí almenna, sum vit kunnu bjóða teimum. Kvinnurnar sakna nærleika, umsorgan og tryggleika. Ein burður er týdningarmikil, og sjúkrahúsini megna ikki at hjálpa og fyrireika kvinnurnar nóg væl til hetta, sigur Mia Jiaya Gilling Borgman.

Fyrr í hesum mánaðinum lótu tríggar ljósmøður egna føðistovu upp í Keypmannahavn. Har bjóða tær burðarhjálp fyri 18.000 krónur.

- Ein kvinna hevur brúk fyri góðari tíð og umsorgan, tá hon er við barn og skal eiga. Júst hetta bjóðar tað almenna ikki í løtuni. Ein burður festir seg djúpt í huganum hjá kvinnuni, og tí eiga tær at fáa eina nágreiniliga frágreiðing um burðin, sigur Ditte Marså, jarðarmóður á nýggju føðistovuni í Keypmannahavn.

*Kelda: Kristeligt Dagblad*

# - Hava ikki tørv á betri burðarhjálp

**Á føðideildini á Landssjúkrahúsinum liggja í løtuni tvær kvinnur - Turið Magnussen og Louisa Fjallsbak, ið báðar hava átt tvíburar: - Vit hava fingið dyggan stuðul, góða hjálp og umsorgan, bæði fyri og eftir burðartíðina, siga tær báðar við ein munn**

BURÐARHJÁLP
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*



*- Tvíburarnir hjá Turið og Rasmus eru ikki eineggjaðir, men líkjast. Genturnar viga ávikavíst 3050 og 2800 gramm og eru 49 og 48 cm til longdar*

12. apríl fingu Louisa Fjallsbak og Julian Thomsen eina gentu og ein drong. Louisa átti fimm vikur ov tíðliga við keisaraskurði, men hóast hetta gekk alt, sum tað skuldi, og tvíburarnir hava tað gott:

- Eg havi fingið sera góða hjálp á Landssjúkrahúsinum. Allar ljósmøðurnar og sjúkrasystrarnar á deildini hava verið óføra dugnaligar, blíðar og veitt mær góðan stuðul. Tvíburarnir eru føddir nakað tíðliga og mugu hjálpast við at eta og halda hitanum. Hesum hava sjúkrasystarnar somuleiðis hjálpt mær væl við. - Tær eru frálíkar barnagentur, sigur Louisa Fjallsbak og leggur afturat, at gjøgnum alla burðartíðina hava jarðarmøðurnar greitt sær gjølla frá øllum:

- Eg havi alla tíð kent meg tryggan, og einki óvæntað er komið fyri, sum eg ikki visti frammanundan. So eg havi avgjørt einki at finnast at hesar 11 dagarnar, eg havi verið á sjúkrahúsinum.

Fyri fýra døgum síðan fingu Turið og Rasmus Magnussen tvær gentur, ið vigaðu ávikavíst 3050 og 2800 gramm. Sjálv varð Turið at kalla tikin á bóli, tá hon fekk at vita, at hon gekk við tvíburum:

- Eg mátti líka svølgja tvær ferðir, men eftir hetta kendist tað heldur sum eitt privilegium. Eg eigi trý børn frammanundan, so tvíburarnir eru at kalla eftirnølarar. So tað er bara frálíkt, at tær eru tvær.

Turið sigur seg ongantíð hava havt tørv á at klaga um nakað sum helst á sjúkrahúsinum:

- Jarðarmøðurnar og sjúkrasystrarnar gera eitt framúr gott arbeiði. Tær hava veitt mær hjálp, stuðul og umsorgan eftir tørvi. Eg átti somuleiðis við keisaraskurði, og tá vóru tvær jarðarmøður um meg alla tíðina. Eg hevði 100% álit á alt, tær gjørdu. Eftir burðin hava tær somuleiðis verið um meg og døtrar mínar. Her her rætt og slætt sera hugnaligt og heimligt at vera, sigur Turið Magnussen at enda.

Annika Hoydal, jarðarmóðir:

# - Føroyskar barnakonur krevja ov lítið

**Í Føroyum tykjast kvinnur ikki eins og í Danmark at vera ónøgdar við burðarhjálpina frá tí almenna - tvørturímóti. - Eftir øllum at døma hava vit í Føroyum eina sera góða burðarhjálp. Eingin klagar um nakað, og tískil verða heldur ongar kollveltandi broytingar gjørdar, sigur Annika Hoydal, jarðarmóðir**



*- Beiggin og diddan hjá Louisu og Julian vigaðu 1665 og 2210 gramm. Hóast tvíburarnir eru føddir fimm vikur ov tíðliga, hava teir tað gott.*

BARNAKONUR
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Hevði tað verið so frægt, at barnakonurnar settu onkur krøv. Eg haldi, barnakonurnar í Føroyum krevja og spyrja alt ov lítið. Í síni heild eru tær ov myndugleikatrúgvar. Vit gera tað gott, men tað er altíð spennandi, tá brúkarin setir veitaranum krøv, tí annars menna vit okkum ongantíð. Í løtuni hava vit onga hóming av, hvussu vit møguliga kunnu gera okkara arbeiði enn betri. Nú er tað soleiðis, at vit fortelja barnakonunum, hvat tær skulu gera og geva teimum tað generella svarið. Sjálvandi koma onkrar til okkara við smáum ynskjum av og á, men av hesum menna vit okkum ikki, og tískil verða ongantíð nakrar kollveltandi broytingar í arbeiðnum, sigur Annika Hoydal, jarðarmóðir á føðideildini á Landssjúkrahúsinum.

Í Danmark keypa alt fleiri danskar kvinnur sær stuðul, umsorgan og tryggleika, áðrenn tær fara á føðistovuna at eiga, meðan aðrar kvinnur rætt og slætt ikki taka ímóti burðarhjálp frá tí almenna, tí jarðarmøðurnar hava ov nógv at gera og skulu ofta ansa eftir fleiri barnsburðum í senn, men hetta er í løtuni eingin trupulleiki í Føroyum, tí á føðideildini á Landssjúkrahúsinum eru altíð tvær jarðarmøður til taks, og Annika Hoydal sigur, at tað er rættiliga sjáldan, at tað er brúk fyri fleiri:

- Í Føroyum eru føðideildirnar smáar, so vit hava sjálvandi ikki sama trupulleika, sum tey í løtuni dragast við í Danmark, har føðistovurnar eru ov stórar, og ov fáar jarðarmøður eru til arbeiðis. Tá ein kvinna eigur í Føroyum, er tað sera sjáldan, at hon noyðist at deila sína jarðarmóður við aðra barnakonu. Men hóast hetta, haldi eg, barnakonurnar saktans kundu sett okkum krøv, leggur Annika Hoydal afturat.

Somuleiðis heldur Annika Hoydal, at politikkararnir áttu at farið og gjørt eina kanning fyri at staðfesta, hvat er gott á føðideildunum í Føroyum, og hvat møguliga kann gerast betri:

- Okkara stóri dreymur er at gera eina fullfíggjaða kanning fyri rætt og slætt at kanna, hvat barnakonur veruliga ynskja sær og hava tørv á. Kanska áttu vit at farið út á aðrar føðideildir uttanlands at kanna, hvussu tey gera sítt arbeiði fyri síðan at koma heim aftur við nýggjum íblástri og síðan gjørt eina skipan, ið riggar væl. Sum nú er, gissa vit at kalla í okkara arbeiði, hóast vit altíð royna at gera okkara besta, ber Annika Hoydal at enda fram.